# Starvsfólk til kredittdeildina

**Kredittdeildin hevur ábyrgd av kredittpolitikki bankans, samskifti við deildir bankans, stýring av bankans váða, inkasso, viðgerð av stórum lániumsóknum o.ø. Í løtuni leita vit eftir dugnaligum starvsfólki at arbeiða við okkara inkassovirksemi.**

### Starvið

Sum starvsfólk á kredittdeildini verður tú bindilið ímillum Føroya Banka og sakførarar. Tú kemur m.a. at gjøgnumganga og taka støðu til mál, sum koma til innheintingar, at umsita skuldarumsitingar, bú- og konkurstilmeldingar o.a. Tú skalt eisini vera til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á kreditt-deildini.

### Tú

Tú arbeiðir við nærlagni, ágrýtni og torir at taka ábyrgd. Tú samstarvar væl og dugir samstundis væl at arbeiða sjálvstøðugt. Harumframt hevur tú viðkomandi útbúgving ella royndir innan bankaverðina ella sum advokatskrivari. Umsøkjarar við kunnleika til peningastovnsarbeiði, eitt nú lán og kredittir, hava fyrimun.

### Meira at vita

Fyrispurningar eru vælkomnir til Torbjørn Andreassen, kredittleiðara, á telefon 330 443 ella á ta@foroya.fo.

Skrivlig umsókn saman við avriti av CV og prógvum skal sendast til starvsfolk@foroya.fo ella til P/F Føroya Banki, Att: Bjarki Mohr, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn og skal vera okkum í hendi **í seinasta lagi 15. august 2008**.

SENDISTOVAN

FØROYABANKI

# Ólavsøkuradio á Rás 2

haraldur



Í 5 dagar bjóðar Rás2 spennandi og stuttligt ólavsøkuradio. Vælupplagdir vertir, raskir reportarar og treiskir tøkningar syrgja fyri, at ólavsøkan ongantíð verður keðilig á Rás2.

Fríggjadagin, leygardagin, sunnudagin og sjálvandi ólavsøkuaftan og ólavsøkudag hevur Rás2 live sendingar við samrøðum, reportasjum, kappingum og nógvum góðum tónleiki.

Og alt endar við einum braki ólavsøkukvøld, tá Haraldur úr sendirøðini E elski Førjar fer at halda røðu úr Rás2 studionum í Vágsbotni og út yvir Nólsoyar Páls torgið.

## Ólavsøkuradio verður sent hesar tíðir

| | |
|---|---|
| Fríggjadag | 25. juli 08.00 – 24.00 |
| Leygardag | 26. juli 13.00 – 24.00 |
| Sunnudag | 27. juli 15.00 – 24.00 |
| Mánadag | 28. juli 13.00 – 24.00 |
| Týsdag | 29. juli 13.00 – 24.00 |

RÁS

...títt ólavsøkuradio